

*Jacob Jónsson slapp lítla løtu at stýra dystargongdini, men eftir at hoyvíkingar pilkaðu hann burturúr spælinum, hevði Kyndil einki móttrekk*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Kyndil-H71 26-33 (16-15):

# Botnurin smurdi toppin av

**Hoyvíkingar sýndu enn einaferð, at teir hava gott tak á Kyndli, og ikki minst, so stríðast teir altíð til tað seinasta**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Sum vit nevndu í leygardagsútgávu okkara, so hevur tað ofta verið so, at hoyvíkingar hava hug at arga Kyndil, tá grannauppgerðir millum feløgini eru á skránni.

At dysturin hesaferð varð leiktur leygardag, og at Kyndils-leikararnir tí kanska eisini høvdu kannað sær bitan, áðrenn teir kundu taka sær av løttum eitt leygarkvøld, mundi ikki hjálpa teimum nakað serligt í so máta.

## Øll tekini vóru greið

Og tað var eisini skjótt greitt leygardagin, at um Kyndil ikki spældi við fullari ferð, orku og konsentratión, so kundi tað skjótt ganga galið.

Hoyvíkingarnir tóktust so ongan tíð hava ætlanir um at lata nakað sum helst fara lættliga, og longu fyrstu løtuna fóru teir undir at toga seg frá Kyndli. Í Levi Nybo hava teir eisini ein málverja, sum við risafetum gongur upp móti teimum allar bestu, og saman við verjuni syrgdi hann fyri, at Kyndil í øllum førum ikki skuldi koma sær fram at nøkrum løttum málum.

Av røttum skuldu allar ávaringarlampur hjá Kyndli fari at lýst longu hesa fyrstu løtuna, men har hendi tó millum lítið og einki. Teir fingu eisini ein at kalla ókeypis møguleika at koma aftur í dystin, tá hoyvíkingar eina løtu drógust við tríggjar útvísingar, og í greiðum yvirtali eydnaðiast eisini Kyndli at vinna seg upp á javnt. Eitt skifti var eisini líkt til, at tað skuldi eydnast liðnum at toga seg heilt leyst. Finnur Hansson, sum ofta roynir tað spektakulera, heldur enn tað sum gagnar liðnum mest, tóktist hava eydnuna við sær hesa løtuna, og hann sendi nakrar sannar perlur upp um verjugarðin og niður undir yvirleggjaran hjá H71. Og eisini Jacob Jónsson tók nú fatur í taktstokkinum, soleiðis sum hann er vanur, og tá er sjáldan stuttligt at standa fyri.

## Mansverjan steðgaði øllum

Men hoyvíkingar fingu tó skjótt steðgað hesum seinasta. Teir løgdu alt fyri eitt ein leikara út á Jacob, og steðgaði aftur fullkomuliga upp hjá Kyndli. Hoyvíkingar togaðu seg alt fyri eitt beint undir liðina á teimum grønu, og fyrstu lítlu løtuna togaðu teir seg aftur framum.

Og so fór tað alla tíðina at verða tungt hjá Kyndli. Tí hóast liðið telir hópin av leikarum, sum mugu roknast millum teir allar bestu føroysku, so megnaði liðið ongan tíð at fáa nakra skipan á spælið, nú Jacob Jónsson fekk sín lut skerdan. Tað fær tó ikki annað enn undrað, at Høgni Klein varð hildin so leingi á beinkinum hesa løtuna. Av leikarum á liðnum man hann helst vera tann, sum er næstur Jacob í leiklutinum sum spælstýrari. Um tað hevði hjálpt Kyndli, er so ein ósøgd søga, men uttan nakra stýring, gjørdist úrslitið rættiliga sjálvsagt. Alt ov ofta busaðu bakkarnir bara beint á verjuna, og heldur enn at breiða spælið, so varð einasta alternativið at tveita bóltin inn á strikuna, og tó at Kyndil eisini her hevur ein landsliðsleikara, so er avmarkað, hvat hesin fær gjørt, um bóltarnir støðugt og einvíst verða tveittir inn móti miðjuni. Ørvur á Lag kom eisini væl frá uppgávuni, tá hann eitt skifti avlastaði Levi í málinum, og tá Levi so kom inn aftur seinastu 10 minuttirnar, hevði hann fingið lyklarnar til málið við av beinkinum, og teir vórðu snaraðir rætta vegin.

## Eyðmýking

At Kyndil bert skeyt trý mál seinasta korterið, sigur helst alla søguna um álopspartin, og heldur ikki í verjupartinum gekst teimum grønu serliga væl. Fyrst og fremst Halgir Dahl Olesen fekk sera leysar teymar, og tó at Kyndil eftir eitt tiltrongt time-out fór út at mansverja bæði hann og Gerster, so var ov seint at venda gongdini. Og at Esbern Patursson so ístaðin trakaði til, mundi bara gera ilt verri hjá Kyndli. Fyri hvørt málið frá hvítu monnunum, stardu Kyndils-eyguni alt meira niður í gólvið, og fyri leikararnar mundi tað kennast sum ein stórur, tá floytan ýldi eftir 30 minuttir. Ein lætti, tí við táverandi dystargongdini í huga, so er lítil ivi um, at hoyvíkingarnir høvdu skorað so nógv fleiri mál afturat, um minuttirnir vóru fleiri í tali.

Men hóast hesa eyðmýkingina, so hava teir í Kyndli ikki ráð til at hanga við høvdinum leingi. Longu komandi vikuskifti er toppdystur á skránni móti StÍF á Skála, og skal Kyndil nú ikki missa sambandið við oddin eina løtu, so er neyðugt við sigri í teirri uppgerðini.

Hovyíkingar skulu tá royna seg móti KÍF, og so er spurningurin, hvørt teir tá kunnu prógva, at talan ikki bert var um eitt einstakt hæddarlop, men at liðið veruliga er um at koma á beint eftir at fýra teir fyrstu dystirnir á árinum allir endaðu við tapi.

### Dysturin í tølum

**Kyndil-H71 26-33 (16-15)**

Málskjúttar

Kyndil: Hans Áki Dal-Christiansen 10(6), Finnur Hansson 7, Josef Abrahamsen 3, Høgni Klein 3, Jacob Jónsson 2, Janus Einar Sørensen 1

H71: Halgir Dahl Olesen 11(4), Henrik Gerster 9(2), Heini Bendtsen 3, Esbern Patursson 3, Johnny Durhuus 3, Tróndur Vatnhamar 2, Magnus Dahl Olesen 1, Niels Viggo Niclassen 1

Brotskøst: Kyndil 8, H71 8

Útvísingar: Kyndil 2, H71 5

Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen & Sámal Hansen. Høvdu ikki stórvegis trupulleikar av lágu leikferðini í dystinum.



Neistin-StÍF 30-28 (16-13):

# Neistin drúgvastur í málveitslu

**Skjúttarnir á liðunum báðum fingu veruliga roynt seg, tá tey bæði beint undir oddinum hittust sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Simona Dziugyte tykist her hava gott tak í verjupartinum. Men tað var tó serliga í álopspartinum, at hon við veldugu skotstyrkini gjørdi um seg sunnudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Skuldi Neistin gera sær nakrar vónir um at halda fast í oddinum, nú longu áðrenn kappingin av álvara er farin ígongd, so var kravið heilt einfalt. Stig skuldu til høldar móti StÍF. Strandakvinnurnar høvdu hinvegin sítt at hugsa um. Við sigrinum á VB fyri viku síðani hildu tær fast um støðuna frammi í oddinum, og enn tvey stig á kontina móti Neistanum høvdu gjørt tað heila enn meira hugaligt hjá liðnum.

## Gott rásarúm

Tað líktist tí einum dysti millum tvey lið, sum vildu leggja nógv fyri í royndunum at vinna, og tað bleiv tað so sanniliga eisini talan um. Skal undirhald mátast í málum, so var talan um ein av teimum heilt undirhaldandi dystunum í kvinnudeildini. At bæði liðini í verjupartinum so eisini hjálptu til í hesum við fløtu verjunum, er ein onnur sannroynd, og í øllum førum gav hetta skjúttunum hjá liðunum báðum góðar umstøður at virka.

Og ikki minst dugdi Simona Dziugyte hjá Neistanum at gera sær dælt av hesum. Ofta hevur hon kanska lyndi til at royna í meira lagi sjálv, og við hvørt vóru eisini ábendingar um hetta sunnudagin. Men tá hon í seinna hálvleiki fekk rætta takið, var ikki at standa fyri hjá StÍF-málverjanum. Tað eru fáir kvinnuligir leikarar í landinum, sum hava eina skotstyrki í hennara flokki, og sleppur hon at gera nýtslu av hesari, so er einki, sum stendur fyri.

Afturat hesari skotstyrkini, so hevur Neistin eisini aðrar frægar leikarar at taka av. Lina Andriulyte sýndi sera gott hegni í at finna neyðugu sendingarnar og eitt nú Ása á Neystabø og Lív Sørensen eru kvikar at fara avstað, tá møguleiki fyri kontraálopum spyrst.

## Mundu mist takinum

Hesir eginleikar sóu leingi út til at geva Neistanum ein tryggn sigur. Stóran part av fyrra hálvleiki var heimaliðið á odda við tveimum og trimum málum, men so skjótt, sum seinni hálvleikur byrjaði, fekk StÍF eitt nógv betri tak á. Ikki minst tí tær hesa løtuna – fyri einastu ferð í dystinum – megnaðu at byrgja fyri skotroyndunum frá Simonu, og í álopsspælinum sýndu tær eisini neyðuga tolið í royndunum at koma at skotmøguleikum.

Men gleðin var tó stokkut. Neistin fekk aftur ferð á í álopsspælinum. Linda á Dunga hevði nakrar týdningarmiklar bjargingar í verjupartinum, og tó at munurin ikki gjørdist hin stóri, so bendi alt á heimasigur. Gestirnir megnaðu ikki at taka seinasta fetið upp til vertirnar, sum soleiðis ognaðu sær tvey týdningarmikil stig í royndunum at sleppa úr ongamannalandi og upp móti heiðursmerkjaplássunum.

Grundað á sigurin móti VB fyri viku síðani, so kundi StÍF kanska liva við, at talan ikki gjørdist um stig hesaferð. Men tað er einki at ivast í, at tær munnu iðra seg um hetta, og nú er kravið, at nøkur stig fáast til vega komandi umførini. Tvær ferðir á rað koma havnarlið tá á vitjan, og megnar StÍF at fáa fulla úrtøku úr hesum, so fer at síggja heilt gott út, áðrenn seinastu dystirnir í endaspælinum standa fyri framman.

### Dysturin í tølum

**Neistin-StÍF 30-28 (16-13)**

**Málskjúttar**

**Neistin:** Simona Dziugyte 13(4), Ása á Neystabø 5, Lina Andriulyte 5, Lív Sørensen 3, Susan Brockie 1, Rakul Augustinusen 1, Marjun Tróndarson 1, Vivian Unadóttir 1

**StÍF:** Paula D. Olsen 8, Milica Ergic 5, Sunfríð B. Jacobsen 5(1), Poula D. Høgnesen 4(1), Anna B. Danielsen 3, Beinta Joensen 2

**Brotskøst:** Neistin 4, StÍF 4

**Útvísingar:** Neistin 5, StÍF 5

**Dómarar úr Kyndli:** Uni Wardum & Hannis Wardum. Høvdu fyri tað mesta eitt gott tak um dystin.

Søljan-Stjørnan 15-23 (9-13):

# Favoritt sigur við hálvari ferð

**Stjørnan setti ongan tíð ferð á ketlarnar, og Søljan megnaði ongan tíð at hótta, tá liðini hittust á Giljanesi**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir at munurin millum topp og botn varð so ruddiliga staðfestur fyri viku síðani, tá Søljan vitjaði í Klaksvík, mundi spenningurin um dystin sunnudagin ikki vera tann heilt stóri.

Og tó at munurin á máltalvuni ikki varð eins sjónskur hesaferð, so mundi tað tó valda lítil ivi um, at tað ikki er í slíkum dystum, at Søljan skal rokna sær nakað stig.

Fyrstu løtuna hesaferð megnaði Søljan tó at halda fast í mótstøðuni, sum fyri tað nógva tóktist hava sera ilt við at motivera seg til at vísa tað heilt stóra. Eisini hóast leikararnir vita av, at tað í apríl mánaði kann verða so, tað verða málini, sum eru avgerandi.

Seinastu minuttirnar undan steðginum eydnaðist tó gestunum at skjóta nøkur mál á rað, og eftir steðgin kundu tær so bara hugsa um at koyra tryggu stigini heim. Tað gjørdu tær eisini, og var talan um koyring úti á vegnum, so høvdu tær helst eisini fingið rós frá ferðslutrygd fyri ikki at bróta nøkur mørk fyri hámarksferð.

Við stigunum tryggjaðu klaksvíkskvinnurnar sær, at tær nú eru á odda í bestu deildini. Á pappírinum hava tær tó ein dyst fleiri enn VB og VÍF, sum altso ikki sluppu í dyst um vikuskiftið. Spurningurin er so, hvørt Stjørnan fer at halda fast um sessin, tá tær næstu ferð skulu í eldin. Tað verður um tvær vikur, og tá er mótstøðuliðið VÍF í Vestmanna, og við verandi gongd, so er einki at ivast í, at hópur av klaksvíkingum tá fer at leita suður eftir at gylgja við, hvussu leikur fer.

Sóljan hevur eisini tá týdningarmiklan dyst. Tá vitja tær nevnliga hjá Kyndli, og tað líkist í øllum førum einum dysti, har Søljan kann skrykkja seg heilt leysa úr botninum. Áðrenn tann dystin bíðar tó ein tann truplasta uppgávan á árinum, tá leiðin gongur til Vág.

### Dysturin í tølum

**Søljan-Stjørnan 15-23 (9-13)**

**Málskjúttar**

**Søljan:** Heidi Maria Akselsen 4, Nicoleta Radu 4(1), Heidi Haraldsen 3, Arnleyg Haraldsen 2, Kristina Griksaite 1, Jana Jacobsen 1

**Stjørnan:** Katarina Stepanov 6(1), Annika Ljósstein 6(1), Una Olsen 5, Bára S. Klakstein 3, Anna Kristina Samson 2, Joan M. Djordjevic 1

**Brotskøst:** Søljan 2, Stjørnan 6

**Útvísingar:** Søljan 5, Stjørnan 1

**Dómarar úr Tjaldri:** Trygvi Mortensen & Kári Hansen.